**HÁTALARAR**
1 sett av JBL hátalarum til sølu, 300W.
*Tlf. 747708*

**NAD**
Effektforstærker 6 x 30 w + Amc forforstærker við Surround 1.800,-
*Tlf. 219868*

**PIONEER ÚTGERÐ TIL SØLU**
Forsterkari GM-X924 130Wx4: 2.000 kr. Forsterkari GM-X622 100Wx2: 1.000 kr. Basskanón 250W: 500 kr. 2 hátalarar, 17 cm diam, 150W: 400 kr. 2 hátalarar, 13 cm diam, 100W: 400 kr.
*Tlf. 213067*

## Út- & Sjónvarp

**SONY TV**
1 ára gamalt Sony KV-29FQ75 100 hz flat screen. Top model við øllum hentleikum + borð + DVD S435. Til sølu vegna flyting, einans kr. 19.995,-. Nýprísur kr. 31.115,-
*Tel. 211211*

## Ymiskt

**FOTOTÓL TIL SØLU**
Eitt ógvuliga lítið brúkt Olympus fototól til sølu. Hevur 35-120mm zoom, dato kann veljast, kann taka panorama bíløt og hevur nógvar aðrar møguleikar. Nýprísur 1800 kr., til sølu fyri 1000 kr.
*Tlf. 322292/227645*

**TIL SØLU**
Óbrúkt Nokia 5510 til sølu fyri 1800 kr.
*Tlf. 317564*

**HYGG HER!**
Um nakar hevur nakað ið skal flytast, fari eg til Danmarkar 13. mars og havi tá rúm fyri 30 kubikkum. Ring á
*tlf. 0045 20973888*

**FERÐAST SAMAN**
Er tað nakar, sum ætlar sær til Føroyar tann 13.03. og aftur til Keypmannahavnar 17.03. Ring
*+45 20783348 ella 316976*

**RADIATORUR TIL SØLU**
Stødd 2400x600 mm. Nývirði 3.500 kr. Nú 1.200 kr. Sær út sum nýggjur. Ring á
*Tlf. 217686*

**ÓBRÚKT KJALLARAHURÐ**
Høgra inn. Hevur rút í. Stødd 80x210 cm. verður seld fyri 3.200 kr. Nýprísur 4.000 kr. Ring á
*Tlf. 217686*

**HEIMAGJØRD HURÐ**
Er nakar, ið kann gera mær eina hurð við okum, klinku og hongslum?
*Tlf. 449996 / 224087*

**GRUNDSTYKKI Í SØRVÁGI**
Eitt 1375 fermetrar stórt grundstykki, ið kann býtast í tvey stykkir. Allarbesta útsýni yvir allan fjørðin. Og bygdina. Til sølu um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 332614 - 225090*

**SIEMENS C45**
til sølu fyri 1.000 kr. Ladari og 1 eyka cover fylgja við.
*Tlf. 224819 ella 224820*

**PENSIONISTAFELAGIÐ HØFT**
á Tvøroyri hevur køkutombola í Keypssamtøkuni fríggjadagin 28. februar kl. 13.
*Nevndin*

**PANASONIC**
GD 87 mobiltlf. til sølu.
*Tlf. 215089*

**GARAGA**
Er nakar, ið kann leiga mær eina garagu í styttri tíðarbil, helst í Havnini.
*Tlf. 321340*

**EYDNUHJÓL**
Eydnuhjól verður í Samljóð 3. og 4. mai.
*Ungmannafelagið Samljóð*

**JØRÐ TIL SØLU**
2 gyllin av jørð til sølu í Gimburhaganum í Sandavági og eisini eitt stykki av jørð ódyrkað, uml. 6.500 fermetrar vælegnað til trøð, um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 332834 eftir kl. 17*

**TUNNUSLÁTTUR Í RÓÐRARNEYSTINUM Á ARGJUM**
Fyri børn kl. 15. Kostn. 20 kr. Pylsur o.a. Fyri vaksin kl. 19. Breyð og okkurt afturvið omaná. Kostn. 80 kr.
*Argja Róðrafelag*

**HURÐAR**
Úthurð 88 x 210 v. út og úthurðarpartí 128 x 210 v. út. Vegna umbygging til sølu fyri ávíkavist 1500 og 2000 kr. ella samlað fyri 3.000 kr.
*Tlf. 219617*

**PLAST- OG TRÆVINDEYGU TIL SØLU**
3 stk. nýggj hvít plast h: 118,5 b: 98,5 + 2 stk. træ brúkt h: 98,5 b: 118,5.
*Tlf. 423488 eftir kl. 18.00*

**ELEKTR. KARÐIMASKINA**
til sølu. Vælegnað til føroyska ull, sum nýggj, einki brúkt.
*Tlf. 312026*

**TIL SØLU**
40 fót bingja til sølu.
*Tlf. 218811*

**FOTOTÓL TIL SØLU**
Canon Ixus II, lítið brúkt og vælhildið. Aps, tekur sera góðar myndir í trimum støddum, v/ datomerking, fyri 1.000,- kr.
*Tlf. 315509 ella 255509*

**FERÐAST SAMAN**
til Billund via KBH 26/2 og heimaftur til Føroyar 14/3.
*Tlf. 267959*

**FERÐAST SAMAN!**
Við Atlantic: Úr Vágum 11.03.03 til Keypmannahavn. Úr Kastrup 24.03.03 til FO.
*Tlf. 258374*

**STELL TIL SØLU**
Eitt stell, beige við brúnligum kanti, (TE MA) 1 kanna, sukurskál, mjólkakrúss, 1 smørskál, pipar/salt, 2 fýrakanta føt, 1 runt fat, 8 koppar við undirskál, 8 desertskálir til sølu.
*Tlf. 255279*

**BÍLIGA TIL SØLU**
Reolsystem 3 undirskáp + 3 yvirskáp , myrkt beisað, breiddin 3x82 cm, hæddin 180 cm.
Sofaborð, massiv fura 2" tjúkk, 91 cm breitt, 140 cm langt, hædd 52 cm.
Spísiborð massiv fura 2" tjúkk, 91 cm x 160 cm, hædd 72 cm + eyka plátu 50 cm lang.
Massivar bók skápshurðar, 2 stk. á 190 cm x 48,5 cm.
Hurða-sektión. Innhurðapartí v/ glasrútum, 140 cm x 240 cm.
Hurðin sjálv stødd 83 cm x 201 cm.
Køkselement v/ vaski, køliskápi, tvær kókiplátur, 120 cm x 60 cm x hædd 90 cm.
Hvítar hurðar og jarnpláta.
Kondisúkkla av slagnum Bodygaard.
Veggjalampa úr furu, sera vøkur.
Tvær hvítar hillar v/ svørtum boylum, 30 cm x 86 cm.
Sambýlið Eysturstræti, Eysturstræti 4, 100 Tórshavn,
*tlf. 319162, kl. 08–16 gerandisdagar*

**GAMALT TIL SØLU**
Breyðskerarar (Rådvad) 150,- Vaskibrettir 150,- Org. setikassar 250 kr. Mess. lampettir, tvær fyri 300 kr.
*Ring 373169*

**YNSKIST**
Eitt ella tvey vindeygu, 90x120, ynskjast til keyps.
*Ring 373169*

FØROYA LANDSSTÝRI

**MENTAMÁLARÁÐIÐ**

# Granskingarstyrkur úr Fólkaskúlagrunninum

Fólkaskúlagrunnurin er ein sjálvsognargrunnur, ið skal veita granskingarstyrk til verkætlanir í námsfrøði innan fólkaskúlaøkið. Grunnurin skal serliga stuðla verkætlanum, sum kveikja og menna arbeiðið í føroyska fólkaskúlanum.

Grunnurin kann lata upp til 75% í stuðli av tí virðisøking, sum stendst av rentutilskriving, vinningsbýti o.til. í undanfarna tvey ára skeiði. Stuðulin verður latin eftir umsókn.

Samsvarandi galdandi viðtøkum fyri grunnin hevur stýrið fyri grunnin gjørt av, at 100.000 kr. íalt kunnu játtast sum granskingarstyrkur til eina ella fleiri verkætlanir, sum eru:

- námsliga kveikjandi fyri undirvísingina í fólkaskúlanum
- námsliga mennandi fyri fólkaskúlan

Stýrið avger, hvørjar verkætlanir verða stuðlaðar, og hvussu stórar stuðulsupphæddirnar verða.

Tey, sum eru áhugað í hesum, kunnu søkja sær granskingarstyrk samsvarandi omanfyri nevndu ætlanum.

Umsókn saman við nágreiniligari verkætlan skal innan 1. apríl 2003 verða send til

**Fólkaskúlagrunnin**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegi 72
FO-100 Tórshavn

## Tvingsilssøla

**Fríggjadagin 21. mars 2003, kl. 9.00** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina **matr. nr. 339, Toftir,** (AS 2-39/2002).

Talan er um eini sethús, ið eru bygd umleið 1980. Húsini eru stoypt úr betongi heilt upp undir takið. Grundøkið er sambært tingbókini 611 fermetrar og eru húsini umleið 120 fermetrar í tveimum hæddum.

Tryggingarskaði hevur verið á ognini og orsakað av hesum eru stórir partar av innrættingini gjørdir av nýggjum.

Húsini eru annars innrættaði soleiðis:

**Kjallarahædd:** Umleið helvtin av kjallarahæddini er innrættað, harav 1 størri rúm, gongd og trappugongd.
**Miðhæddin:** Gongd, køkur, stova, hjúnarúm, 2 kømur, 1 baðirúm við wc og brúsu og 1 baðirúm við wc og baðikari.
**Loftshæddin:** Talan er um »ovastaloft« ið er óinnrættað.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 4467401)**, sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur**
hin 25.2.2003

HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL
Hygg her!
mánadag - hósdag frá kl. 11.00 - 21.00
fríggjadag - leygardag frá kl. 11.00 - 15.00
AIRPORT STEAK
við kipsi og persillusmøri ella bearnaisesós og broysknum salati


bara 68,-
HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA
SØRVÁGUR
TEL 33 29 55 · FAX 33 23 10 · T-Postur: hotel@ff.fo
team85

VÆLVERA
frá Sissel

Koddar
Sitipútur
Stuðul rygg/nakki
Bóltar og rullir til massagu v.m.
Fæst hjá siri
lív & heilsa
Siri spf • Dr. Jacobsensgøta 18 • FO 100 Tórshavn
Telefon 31 66 10 • Fax 31 66 10

Íbúð til leigu
frá 1. mars. Egin inngongd.
Tlf. 213388 og 310767

Lesið
Sosialurin
-tað loysir seg



# HEILSANIR


Hjartaliga tillukku við 7 ára føðingardegnum. Tú ert tann besta.
**Heilsan mamma, babba, Rúni, Lis og Pedro**


**Góða Annika!**
Hjartaliga til lukku við degnum. Minnist tú hesa løtuna?
**Heilsan vit, sum vóru við**


**Góða Elisabeth Andrea**
Hjartaliga tillukku við tínum 5 ára degi.
**Kærar heilsanir omma og abbi í Hvannkróki**


**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við 80 ára føðingardegnum 26. febr. Alt gott í framtíðini. Heilsan frá okkum
**Heidi og Brynhild**


**Góði Jónas**
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum í dag. Alt gott í framtíðini.
**Ynskja mamma og babba**


**Góði lítli beiggi**
Tillukku við 2 ára degnum í dag. Eg elski teg.
**Heilsan Dann Hjalti**


**Góða elskaða omma**
Hjartaliga tillukku við 80 ára føðingardegnum í dag. Øll góð ynskir í framtíðini. Kærar heilsanir frá okkum
**Pól Jakku**


**Góða Anja**
Hjartaliga tillukku við 22 ára degnum 24. febr.
**Ynskir Anfinn**


**Góðu synir**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum 10. og 22. febr. Jesus signi tykkum.
**Mamma**


**Góða Annika**
Hjartaliga til lukku við degnum. Hetta er áðrenn, tú fórt til Havnar at búgva.
**Heilsan mostrarnar á Víkavegnum**


**Góða Birna**
Hjartaliga tillukku á 20 ára degnum. Jesus pápi vælsigni framtíð tína ynskja
**Omma, abbi, mammubeiggjarnir og langabbi**


**Góða Didda!!**
Hjartaliga til lukku við føðingardegnum í dag. Tú ert tann fittasta didda í verðini.
**Heilsan eg**


**Góði Jonhard**
Hjartaliga tillukku við 12 ára føðingardegnum 23. febr. Jesus signi framtíð tína.
**Omma og Jón**


**Góði langabbi**
Hjartaliga tillukku við 80 ára degnum. Eisini ein heilsan til langommu.
**Ynskir Heini**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.......................................................................
.................................................................................
.................................................................................
.................................................................................
.................................................................................
.................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .........................................................................
Bústaður: ...................................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«